# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 26.05.2014*

**Bygdaráðsfundur  26.05.2014  kl. 16.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 55/2014 Fíggjarmál**

J.nr. 2014-0011-0050

**Málslýsing**

Hin 12.05.2014 kom roknskapurin hjá Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmælið**

Á fundi 19.05.2014  mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 56/2014 Ymiskt**

J.nr. 2014-0015-0016

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av kostnaðinum til at mála Vesturskin uttan.

Nes kommuna hevur biðið, Colorama v/ Petur Gaardlykke, um tilboð uppá at mála Vesturskin uttan.

Tilboðið frá Colorama er uppá íalt kr. 67.686,00 u/mvg íroknað arbeiðsløn.

Nes kommuna hevur eisini biðið um tilboð uppá at mála gongina á Vesturskin. Arbeiðið umfatar veggir, listar og o.a. Colorama kann gera hetta arbeiðið fyri kr. 19.600,- u/mvg.

**Tilmælir**

Á fundi 14.04.2014 mælir Tekniska nevnd til, at Vesturskin verður málað uttan og taka av tilboðnum frá Colorama á kr. 67.686,00 u/mvg.

Tekniska nevnd mælir frá, at gongin verður málað nú.

Á fundi 23.04.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmælið**
Á fundi 19.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð, og at kostnaðurin verður broyttur til kr. 72.000,00, tá er kommunurnar partur av mvg á 6,25% við.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 57/2014 Havnin**
J.nr. 2014-0046-0071
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av kostnaðinum av kaðalgrøv í Oyrunum.

Tekniska deild hevur gjørt eina kostnaðarmeting yvir kaðalgrøv í Oyrunum, frá KBH bygninginum suður til Nyk. Longdin er 230 metrar, íroknað stikkleiðingar.

Arbeiðið verður gjørt samb. krøvunum til m.a. burturleiðing av spillivatni, vatnveiting, el/tele-veiting og upplýsing av økinum. Tá hetta arbeiðið er gjørt, kann økið asfalterast.

Kostnaðarmetingin frá Teknisku deild, Aksel Højgaard, dagfest 8. apríl 2014, er áljóðandi kr. 378.800,- u/mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 14.04.2014 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið, viðv. kaðalgrøv í Oyrunum og út á Nyk, verða gjørd.

Á fundi 23.04.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, at lønin, sum er kr. 105.000,00, verður tikin av stovninum vegir, og kr. 263.000,00 verða av tøkum peningi.

Á fundinum avgjørdi Fíggjarnevndin eisini at kanna hvat tað kostaði at asfaltera økið omanfyri bátabrúnna, niðanfyri Turkiðhúsið. Talan er um eitt øki uppá millum 550 og 600 m².

**Málslýsing**
Tekniska deild hevur heitt á EM-Asfalt um at koma við einum tilboði uppá arbeiðið av at asfaltera økið oman fyri bátabrúnna og niðanfyri Turkihúsið. EM-Asfalt hevur givið tilboð uppá at gera arbeiðið fyri kr. 126.540 u/mvg, herav kr. 28.500 er fyri klárgering. Talan er um eitt øki uppá 570 m², og arbeiðið kann verða gjørt í viku 18.

**Tilmælið**
Á fundi 26. apríl 2014 viðgjørdi Fíggjarnevndin tilboðið frá EM-Asfalt, og samtykti at taka av tilboðnum uppá kr. 126.540, 00, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmælið**
Á fundi 19.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð, og at upphæddin á kr. 263.000,00 verður broytt til kr. 274.000,00.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**<u>Mál nr. 58/2014 Byggimál</u>**
<u>J. nr. 2014-0042-0329</u>
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av at flyta peningin, sum er avsettur til íløgur á Svangaskarði, til viðlíkahald.

Fótbóltsambandið og Nes kommuna hava seinastu árini dagført Ítróttarøkið á Svangaskarði. Nú er avgjørt at umvæla tekjuna, og at tað verður Nes kommuna sum skiftir tekjuna á Ítróttarhúsinum á Svangaskarði. Arbeiðið er boðið út til tríggjar arbeiðstakarar og er tilboð komið frá tveimum teirra. Tilboðið frá Sp/f Búsetur er áljóðandi kr. 336.992,00 og frá Byggivirkinum KBH sp/f er tilboðið áljóðandi kr. 315.510,00. TN Bygging bjóðaði ikki. Innkomnu tilboðini blivu gjøgnumgingin á fundi hjá bygginevndini 14.04.2014.

Á fundinum mælti bygginevndin til at taka av lægsta tilboðnum, sum var frá byggivirkinum KBH dagfest 08.04.2014 áljóðandi kr. 315.510,00 u/vmg.

**Tilmælir**
Á fundi 14.04.2014 mælir Tekniska nevdn til, at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

À fundi 23.04.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, at peningurin verður tikin av stovninum Svangaskarð, og at peningurin á kr. 360.000,00, sum eru avsettar til íløgur Svangaskarð, verða fluttar til viðlíkahald.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmælið**
Á fundi 19.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 59/2014 Havnamál**
J.nr. 2012-0046-0055
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av kostnaðinum fyri havnalagið inni á Rætt.

Í illveðrinum, sum var í desembur 2013 og januar 2014, kom skaði á fylluna innanfyri verjugrótið sunnanfyri og norðanfyri. Nógv hevur verið tosað um, hvat best er at gera fyri at bøta um hesi viðurskiftir.

Nes kommuna hevur biðið um uppskot á loysn og tilboð frá J&K Petersen og frá JHR Entreprenørar.Kommunan hevur fingið uppskot um loysn og tilboð frá báðum.

**Tilmælir**
Á fundi 18.03.2014 mælir Tekniska nevnd til at gera arbeiðið soleiðis, sum JHR skýtur upp og taka av tilboðnum frá teimum, áljóðandi kr. 368.000,- uttan MVG, og er hetta arbeiðið framhald av verandi grótgarði.

Á fundi 24.03.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og mælir til, at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmælið**
Á fundi 19.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð, og at upphæddin verður fíggjað við lántøku.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 26.05.2014*

**Mál nr. 60/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0011-0033
**Málslýsing**
Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða roknskapinum fyri 2013 hjá Nes kommunu, soleiðis sum hann er uppsettur av SPEKT.

Roknskaparleiðarin hjá Nes kommunu, framlegði roknskapin fyri bygdaráðnum.

**Avgerð**
Bygdaráðið viðgjørdi roknskapin, og hevði ikki ítøkuligar viðmerkingar. Bygdaráðið samtykti at góðkena roknskaðin fyri 2013.

**Mál nr. 61/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0004-0022
**Málslýsing**
Samb. Løgtingslóg nr 87 frá 17. mai 2000 skal støða takast til um kommuna skal velja nýggjan grannskoðara, ella halda áfram við tí sama.

**Tilmælið**
Á fundi 26.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at SPEKT heldur fram sum grannskoðari hjá Nes kommunu.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 62/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0009-0004
**Málslýsing**
Umsitingin hevur arbeitt við eini reglugerð viðv. tryggingum hjá Nes kommunu.

**Tilmælið**
Á fundi 19.05.2014 hevur Fíggjarnevndin gjøgnumgingið uppskotið um reglugerð viðv. tryggingum. Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við uppskotinum um reglugerð viðv. tryggingunum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 26.05.2014*

**Mál nr. 63/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0011-0051
**Málslýsing**
Hin 26.05.2014 kom fíggjarætlanin fyri 2015, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, til ummælis hjá kommununi.

**Tilmælið**
Á fudi 26.05.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Bókasavninum soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndi var einmælt samtykt.

**Mál nr. 64/2014 Ymiskt**
J.nr. 2014-0025-0003
**Málslýsing**
Skriv er komið hin 01.05.2014 frá GreenGate Inncomming, í sambandi við Sólarmyrkingina 2015. Heitt verður á Nes kommunu um at geva loyvi til einar 8-10 bussar at koyra út til vindmyllurnar millum kl. 07.00 - 08.30 og heimaftur uml. kl. 10.00 - 10.30, so tey hava staðið fyri seg sjálvan til teirra kundar.

**Tilmælir**
Á fundi 13.05.2014 mælir Tekniska nevnd til, at bussarnir fáa loyvi til at koyra eftir Mylluvegnum hendan dagin talan er um, og at fyrisitingin hjá Nes kommunu fer í samráð við GreenGate um, at samskipað dagin á besta hátt,

Á fundin 15.05.2014 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Vinnunevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 65/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-0330
Byggiloyvi til seyðahús/skýlið

Í skrivi 22.04.2014 søkir Kjartan Højgaard um byggiloyvi til at byggja seyðahús/skýli á tað gamla vatnbasengið á Roykheyggi.

**Tilmælið**
Á fundi 13.05.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvið við teimum treytum, sum Umhvørvisstovan og Nes kommuna áseta, og at Nes kommuna fær eina meira útførligari tekning av húsinum, og at hendan er áteknað.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 66/2014 Vegamál**
J.nr. 2014-044-0071
**Málslýsing**
Í skrivi 25.04.2014 vísir borgari á, at hann, í skrivi til Nes kommunu 01.07.2008, spurdi um ætlan var at gera gongubreyt á Nesvegi, ið var í upprunaætlanini. Borgarin vísti tá á tann stóra trupulleikan, tey hava av høgari ferð, og spurdi eftir ferðtálmandi tiltøkum. Borgarin fekk bert svar uppá gongubreytina í 2008.

Trupulleikin og ampin av høgu ferðini er ikki minkaður, og spyr borgarin eftir ferðtálmandi tiltøkum á Nesvegi.

**Tilmælð**
Á fundi 13.05.2014 mælir Tekniska nevnd til at arbeiða víðari við málinum, og at ferðslunevndin saman við ferðslupolitinum fer at hyggja uppá skelting av økinum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 67/2014 Frítíðarvirksemi**
J.nr.2014-0024-0025
**Málslýsing**
Í skrivi 05.05.2014 søkir borgari um fíggjarligan stuðul til at gera ein sparkivøll á matr. nr. 83c Eysturi í Líð á Nesi.

Tankin er, at kommunan stuðlar hesum arbeiði og letur tilfar til planering. Hvussu nógv arbeiðið kemur at kosta er óvist enn, ætlanin er at fáa ein entreprenør at gera eina kostnaðarætlan.

**Tilmælið**
Á fundi 13.05.2014 mælir Tekniska nevnd frá at stuðla ætlanini og boða borgaranum frá, at kommunan ikki hevur ætlanir um at gera sparkivøll Eysturi í Líð.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 68/2014 Umhvørvismál**
J.nr. 2014-0047-0036
**Málslýsing**
Í skrivi 13.05.2014 søkir festari um loyvi til at taða fram við vegnum sum gongur út á Húslongd.

**Tilmælið**
Á fundi 13.05.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta festaranum loyvi til at taða eftir galdandi reglum.

Mortan Højgaard var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Mortan Højgaard var úti meðan málið var viðgjørt